Bilasølan fyrstu sjey mánaðirnar í ár:

Toyota framvegis á odda

BILASØLA

Sambært yvirlitinum frá Bileftirlitinum um mest seldu bilar fyrstu sjey mánaðirnar í ár er Toyota framvegis á odda.

Hóast bilasølan Meinhardt Arge næstan hevur selt eins nógvar bilar, sum Reyni Service, so er Toyota framvegis nógv best umtókti bilurin – og hevur Reyni Service næstan bara selt Toyotabilar í ár. Av teimum 227 bilunum, seldir eru, eru teir 222 Toyota, meðan Reyni Service hevur selt 5 Iveco.

Topp 10 listin yvir mest seldu bilmerkini sær soleiðis út:

1. Toyota	222
2. Ford	116
3. Mazda	100
4. Citroën	99
5. Opel	96
6. Peugeot	89
7. Honda	52
8. Volkswagen	45
9. Hyundai	32
10. Honda	32

Søgan um feilfría bilin

Mazda 626. Ein eydnurík blanding av *siðvenjum* og *framkomnari tøkni* innan bilar. Ment bæði í Europa og í Japan fyri at blanda tað besta frá teimum báðum bilmentanunum. Skaptur við djúpari virðing fyri øllum tí, ið hevur gjørt 626'bilarnar tiltiknar, men samstundis hóskandi til tann modernaða lívsstílin. Hygg nærri at einum Mazda 626, so sært tú tvær ymiskar síður: *Royndur* og *ungdommiliga spelkin*. Tú gerst bilsin yvir, at tað sterka uttaná, fevnir um eina so *rúmliga kabinu*. Møguliga hevur tú trupult við at gjøgnumskoða, um ein smálutur á bilinum er skaptur av estetiskum ella praktiskum orsøkum. Svarið er hvørja ferð: Báðum. *Harmoni er loyniorðið* til sniðið á 626' bilunum. Ein gjøgnumhugsað blanding av *snøggleika og virkisføri*. Hjá Mazda spurdu vit okkum: "Kunnu vit uppfylla dreymin um ta fullgjørdu koyrigleðina og samstundis tryggja, at alt tað praktiska virkar perfekt og lýtaleyst?" Svarið er ja. **Bilurin eitur Mazda 626.**

Kom inn á gólvið og royn tey nýggju 626 modellini.

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

Sosialurin 311820

Bilasølan fyrstu sjey mánaðirnar í ár

Reyni Service	**227**	**bilar**
Toyota	222	
Iveco	5	
Meinhardt Arge	**223**	
Nissan	38	
Opel	96	
Peugeot	89	
Ivan Johansen	**121**	
Citroen	99	
Mitsubishi	13	
Mercedes	6	
Huyndai Gal/Che	3	
Wenzel	**116**	
Ford	116	
Nordbil	**116**	
Honda	52	
Hyundai	32	
Skoda	32	
Johannes Berg	**103**	
Mazda	100	
Scania	3	
Bilasølan Øssur Johannesen	**57**	
Audi	6	
Seat	6	
Volkswagen	45	
VR-Bilar	**55**	
Renault	25	
Volvo	30	
Esmar Simonsen	**24**	
Daewoo	24	
Bilfríðkan	**24**	
BMW	9	
Fiat	15	
Eyðbjørn Hansen	**17**	
Suzuki	17	
John P. Vilhelm	**6**	
Saab	6	

Tilsamans eru 1129 bilar seldir fyrstu sjey mánaðirnar í ár.

Berg Motors - hava áhugaverda Mazda vøruskrá

Hjá Berg Motors á Hálsi hava tey í hesum døgum fleiri áhugaverd Mazda-tilboð. Til dømis Mazda 626, Premacy, E2200 og B2500, sum eru væl útgjørdir bilar, til sera sámuligar prísir

BILAR
Magnus Gunnarsson

Mazda 626 hevur í mong ár verið kosin sum tann bilur í sínum klassa, ið hevur havt minst brek. Av somu orsøk hevur 626 verði nógv brúktur sum firma- og familjubilur. Bilurin, ið fæst sum sedan og combicoupé, er sera rúmligur og hevur stórt viðførisrúm. Tað sum er mest áhugavert við 626 í løtuni, er, at hann í sedan útgávuni fæst sum ein sera væl útgjørdur bilur við prísum niðan fyri 200.000 krónur. Til dømis kostar 1.8i LX sedan við 100 hk 189.700 krónur og 2.0i GLX sedan við 115hk 198.700 krónur.

Mazda Premacy

Mazda Premacy er ein rúmligur MPV familjubilur við ágangandi designi. Ein bilur, har man situr høgt við góðum útsýni allar vegir. Bilurin hevur framúr góðar koyrieginleikar, er einans 4.30 metrar langur, viðførisrúmið er 420 litrar og við baksetrunum niðri eru heilir 1848 litrar at ráða yvir.

Bilurin hevur 5 sitipláss, og fyri 8000 krónur fæst eitt eykasetur at seta aftan fyri baksetrið. Í GLX útgávuni er Premacy sera væl útgjørdur og hevur til dømis traction control, el-rútar el-síðuspegl, sentrallás við fjarstýring, el-hita í framsetrunum, eyka lyktir, air-condition. Eisini hevur hann startsperru við dupultari læsing. Premacy 1.8i LX 100 hk kostar 175.700 krónur. 1.8i GLX 100 hk kostar 187.700 krónur. Og 1.8i GLX 115 hk kostar 196.700 krónur.

B2500 Pick-up

B-serian hjá Mazda fæst nú við 2.5 litur Turbodiesel motori við Intercoolara og 110 hk. Bilurin verður gjørdur í útgávunum StandardCab, StrechCab og DoubleCab við 2 ella 4 hjólstrekk. Á StandardCab er fররarahúsið stutt, og bakrúturin er beint aftan fyri setrið. StrechCab hevur nakað størri fররarahús, og eitt rúm er millum setrið og bakrútin. Á DoubleCab eru tvær rekkjur av setrum, og 5 sitipláss. Tað vil siga, at man í veruleikanum hevur bæði ein pick-up og ein persónbil í sama bili. Hesin bilurin kostar við allari útgerð og 4-hjólstrekk, skrásettur sum persónbilur, 255.700 krónur. Um man ynskir bilin við trælast, kostar tað 18.000 krónur eyka.

E2200 og Demio

Mazda B2500 og E2200 verða nógv brúktir til arbeiðsbilar, so sum til útróðrarmenn, múrarar og aðrar handverkarar. E2200 fæst bæði sum vørubilur, bussur og við trælast. Ein E2200 við trælast, ið hevur 2,2 litur dieselmotor, lastar 1,7 tons, kostar 127.760 krónur. Umframt omanfyri nevndu bilar er eisini Mazda Demio, ið er ein mini-MPV. Hesin er væl egnaður til býkoyring, við tað at hann er sera arbeiðsligur, tekur lítið pláss og er lættur at parkera. Demio við 1.3 litur motori kostar 129.700 krónur.

Her eru Karin C. Hammer og Axel Ljósheim uttan fyri Berg Motors á Hálsi við tveimum svørtum bilum, einum Mazda 626 sedan og einum Mazda Premacy